

# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Skeið í heyst

### Málskeið í russiskum

**Málbólkur: Vinnulívsfólk og onnur, ið hava samband ella samstarva við Russland**

**Tíðarskeið:**

**Frá 3. oktober 2006 til 29. mars 2007, týs- og hósdag kl. 13.00-14.30**

Endamálið er at gera fólk før fyri at málbera seg á vanligum russiskum, lesa tekstir og hava grundleggjandi kunnleikar til mentanarlig og búskaparlig viðurskiftir í Russlandi.

**Skeiðið fevnir um:**

- lesing, samtalu, mállæru
- mentan, búskap, vinnulív

**Skeiðleiðsla:** André Niclasen, cand.mag. Luttøka av russum í Føroyum verður eisini.

**Tilmelding: áðrenn 26. september 2006**

### Málrøkt og talgild journalskipan

**Málbólkur: Málsviðgerar, starvsfólk og onnur á almennum stovnum, sum í dagliga yrki sínum takast við málsavgreiðslu.**

**Tíðarskeið: 25. og 26. oktober 2006 kl. 09.00-16.00**

Endamálið við skeiðnum er at fáa innlit í málsgongdir, frá tí mál tekur seg upp, til tað er liðugt viðgjørt. Greitt verður eisini frá ymsum fyribrigdum, ið lætta um og samstundis tryggja eina góða málsgongd. Eisini verður nortið við, hvussu mál verða varðveitt á besta hátt, so at innihaldið ikki fær skaða ella verður burtur.

**Skeiðið fevnir um:**

- Samspæl millum journal og málsviðgerð
- Dagligar mannagongdir - eftirstøðueftirlit
- Lógarkrøv arbeiðsgongdir fysisk málrøkt

**Skeiðleiðsla:** John Kjær, skjalavørður og Sofus Borðoy, journalleiðari

**Tilmelding: áðrenn 16. oktober 2006**

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

TEAM85

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

# Goymsluleiðari

Til umsiting av goymslu okkara søkja vit eftir fólki at byrja skjótast til ber.

**Starvsøkið:**
Sum goymsluleiðari hevur tú ábyrgdina og dagliga raksturin av goymsluni, við hesum vørumóttøku og –útflýggjan, vørumerking, goymsluuppgerð v.m. Eisini kemur tú at standa fyri menning og betran av mannagongdum í.s.v. goymslustýring. Onnur ábyrgdarøki eru eisini knýtt at starvinum. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við sølu- og tænastudeildir okkara, her undir eisini Farodane City og Casa.

**Førleikakrøv:**
Umframt hollan kunnleika og/ella starvsroyndir innan goymsluøkið vænta vit at tú:

- ert álítandi, ábyrgdarfull/ur og ágrýtin
- tolir arbeiðstrýst og stundum skiftandi arbeiðstíðir
- ert tænastusinnað/ur, skipað/ur og skyldurøkin
- hevur góð samstarvsevni
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur koyrikort, við fyrimuni stóra koyrikortið og trukkføraraprógv

**Á Farodane bjóða vit tær:**
Eitt avbjóðandi, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult starv í eini eldri, men nútímans fyritøku í stórari menning. Saman við 50 starvsfeløgum kemur tú at mynda landsins fremsta skrivstovuveitara, har vit gjøgnum álit, ábyrgd og áræði hava sum aðalstevnumið at vera sjálvsagdi samstarvsfelagin.

Sært tú teg sjálvan sum part av hesum, frætta vit fegin frá tær. Ynskir tú at hoyra nærri um starvið ert tú vælkomin at seta teg í samband við starvsfólkadeildina. Løn í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan mánadagin **18. september 2006** og stílast til:

Farodane P/F
Starvsfólkadeildin
Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn

FARODANE

Brekkutún 4 Postboks 109 FO-110 Tórshavn Tlf: 311414 farodane@farodane.fo www.farodane.fo

*Farodane P/f er 56 ára gomul handils- og tænastufyritøka, sum í dag er millum fremstu heildarveitarar til skrivstovuna. Umframt høvuðsvirksemið innan sølu og tænastu av KT-loysnum reka vit skrivstovumarknaðin Farodane City, møblasøluna Farodane Casa, umframt skeiðstovuna Kvasir.*

# FØRARI TIL betongpumpubil

Søkt verður eftir fólki at koyra betongpumpubil.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og koyrt verður av blandistøðini á Hjalla.

Tann, ið settur verður kemur at hava ábyrgdina av betongbilinum og skal vera røkin.

Byrjast kann beinanvegin ella eftir nærri avtalu

J&K

P/F J & K Petersen · Tel 58 50 25 / 58 50 01 · e-mail jkp@jkp.fo

# FÓLK SØKIST

Í samband við at vit víðka deildina í Havn við nýggjum hølum, sóknast vit eftir dugnaligum og fleksiblum starvsfólkum til sølu og dekoration.

Tað er umráðandi at tú ert tænastusinnað/ur, ert blíð/ur av lyndi og trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 26. september.



Thomas Dam búnýti

NIELS FINSENS GØTA 18 · POSTBOKS 81 · 110 TÓRSHAVN · TEL 31 49 30